Nr. 9/2019

Ingilín Didriksen Strøm
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um veðurlagslóg og CO2 útlát, settur landsstýrismanninum í vinnu- og umhvørvismálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta ítøkilig tiltøk í verk til tess at lækka føroyska útlátið fram móti 2030?

2. Um so er, hvørji tiltøk ætlar landsstýrismaðurin at seta í verk og nær?

3. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera eina veðurlagslóg við nágreiniligum útrokningum, tíðarásetingum og ætlanum sum t.d. *klimaloven*, sum er í umbúna í Danmark?

Viðmerkingar:
Undanfarna landsstýrið hevur við Paris sáttmálanum samtykt at minka um føroyska CO2 útlátið við 45% fram til 2030. Hetta fyri at halda økingini í alheimshitanum undir 2 hitastig í mun til áðrenn ídnaðarsamfelagið. Veðurlagsvísindafólk eru á einum máli um, at hetta er eitt absolutt minstakrav. IPCC frágreiðingin, sum veðurlagspanelið hjá ST gav út í 2018, vísti, at sjálvt ein øking á 1,5 hitastig fer at hava ógvusligar broytingar við sær í mun til bæði veðurlag og margfeldi.

Altjóða felagsskapurin, IMO, hevur harumframt sett sær sum mál, at í 2050 skulu dálkandi evni frá skipum verða minkað við í minsta lagi 50%.

Umhvørvisstovan boðaði í farnu viku frá, at samlaða útlátið úr Føroyum frá 2017 til 2018 øktist góð 12%, um alt er tikið við. CO2 útlátið er vaksið á hvørjum ári síðan 2011. Seta vit ikki ítøkilig átøk í verk fyri at minka um útlátið, megna vit hvørki at halda okkum til málini hjá IMO ella Paris sáttmálan. Ein háttur at tryggja, at ítøkilig átøk verða sett í verk, er at gera eina veðurlagslóg eins og tann, sum er í umbúna í Danmark í løtuni[1]. Eina veðurlagslóg, sum inniheldur nágreiniligar útrokningar, tíðarásetingar og ætlanir. Ein slík lóg hevði somuleiðis tryggjað umhvørvisátøk tvørtur um valskeið.

Á Løgtingi, 16. oktober 2019

Ingilín Didriksen Strøm

[1] https://www.dr.dk/nyheder/politik/regeringen-begynder-pa-klimalov-i-denne-maned?fbclid=IwAR3Iorx9w-BLH8gICGMyiVYdH1FQD-kh2lsxwJ7Lj3JiMo6gaLFuDfcD3Wg